# P/F VÁGATUNNILIN

## TÓRSHAVN

## ÁRSFRÁSØGN

## 2011

**AVRIT**

# Innihaldsyvirlit

**Síða**


**Átekningar**

| | |
|---|---|
| Leiðsluátekning | 1 |
| Váttan frá óheftum grannskoðara | 2 |

**Leiðslufrágreiðing**

| | |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 4 |
| Høvuðs- og lyklatøl | 5 |
| Leiðslufrágreiðing | 6 |

**Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2011**

| | |
|---|---|
| Nýttur roknskaparháttur | 7 |
| Rakstrarroknskapur | 12 |
| Fíggjarstøða | 13 |
| Gjaldførisfrágreiðing | 15 |
| Notur | 16 |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2011 hjá P/F Vágatunnilin.

Ársfrásøgnin er sett upp í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu, rakstrarúrslitinum og peningastreyminum.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, tann 27. mars 2012

**Stjórn**

Uni Danielsen
stjóri

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Jens Kári Vilhelm<br>formaður | Dánial Thomsen<br>næstformaður | Mathea Hilduberg |
| Marita Hentze | | |

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann

_____________________________
fundarstjóri

# Váttan frá óheftum grannskoðara

*Til leiðsluna í P/F Vágatunnilin*

## Átekning til ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F Vágatunnilin fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2011 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn, peningastreymi og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

# Váttan frá óheftum grannskoðara

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2011 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2011 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Vit hava, sum ásett í ársroknskaparlógini, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, tann 13. mars 2012

**Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT**
løggilt grannskoðaravirki

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

# Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | P/F Vágatunnilin<br>Hoyvíksvegur 65<br>FO-100 Tórshavn | |
| | Telefon: | 350200 |
| | Telefaks: | 350201 |
| | Heimasíða: | www.tunnil.fo |
| | Teldubústaður: | tunnil@tunnil.fo |
| | Stovnað: | 21. desember 1998 |
| | Kommuna: | Tórshavn |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |

**Nevnd**

Jens Kári Vilhelm, Hoyvík
Dánial Thomsen, Sandavágur
Mathea Hilduberg, Tórshavn
Marita Hentze, Argir

**Stjórn**

Uni Danielsen, Hoyvík

**Grannskoðan**

**Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT**
løggilt grannskoðaravirki
R. C. Effersøesgøta 26, Postrúm 191, FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 47 00 - Telefax: 31 38 15
Teldubústaður: inpact@inpact.fo
Heimasíða: www.inpact.fo

## Høvuðs- og lyklatøl

| | 2011<br>t.kr. | 2010<br>t.kr. | 2009<br>t.kr. | 2008<br>t.kr. | 2007<br>t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur:** | | | | | |
| Nettosøla | 22.248 | 21.127 | 22.796 | 21.665 | 25.439 |
| Bruttoúrslit | 19.413 | 18.562 | 18.658 | 19.506 | 21.644 |
| Rakstrarúrslit | 4.040 | 2.883 | 3.266 | 3.736 | 6.549 |
| Fíggjarligir postar, netto | -1.821 | -2.382 | -2.774 | -3.211 | -4.283 |
| Ársúrslit | 1.819 | 411 | 403 | 430 | 1.858 |
| **Fíggjarstøða:** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 207.099 | 216.430 | 230.393 | 264.848 | 267.658 |
| Eginogn | 166.024 | 164.205 | 163.794 | 163.391 | 162.960 |
| **Peningastreymar:** | | | | | |
| Rakstur | 13.314 | 10.063 | 14.704 | 4.293 | 27.115 |
| Íløgur | -783 | -564 | 0 | 89 | 225 |
| Fígging | -11.773 | -11.454 | -35.837 | 4.126 | -13.275 |
| **Starvsfólk:** | | | | | |
| Starvsfólk í miðal | 8 | 8 | 8 | 8 | 8 |
| **Lyklatøl í %: *)** | | | | | |
| Skiftisavkast | 87,3 | 87,9 | 81,8 | 90,0 | 85,1 |
| Rakstraravkast | 18,2 | 13,6 | 14,3 | 17,2 | 25,7 |
| Trygdarevni | 80,2 | 75,9 | 71,1 | 61,7 | 60,9 |
| Renting av eginogn | 1,1 | 0,3 | 0,2 | 0,3 | 1,1 |

*) Lyklatølini eru greidd í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings "Anbefalinger & Nøgletal 2005". Lyklatølini eru allýst undir nýttum roknskaparhátti.

# Leiðslufrágreiðing

### Virksemi

Endamál felagsins er at útvega fast samband millum Streymoy og Vágoy, hava rakstur og fast samband um hendi, umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið. Felagsins virksemi í farna ári hevur í høvuðsheitum verið at reka tunnilin undir Vestmannasundi og annars at gera neyðugar ábøtur. Undirsjóvartunnilin lat upp fyri almennari ferðslu 10. desember 2002.

### Lógargrundarlag

Felagið varð stovnað við 20,3 mió.kr. í løgujáttan á fíggjarløgtingslógini og eykajáttanarlógini fyri 1998. Ognarrættur, eftirlit, peningajáttan 160,3 mió.kr., krøv til felagið, nýtslugjøld, ognartøka, skattlig viðurskifti, eftiransing og kunning eru ásett í Ll. nr. 6 frá 08.02.2000 (Anleggslógin) um "fast samband um Vestmannasund.

### Gongdin í virksemi og fíggjarligum viðurskiftum

Ársins nettosøla er 22.248 t.kr. ímóti 21.127 t.kr. seinasta ár. Úrslitið eftir skatt er 1.819 t.kr. ímóti 411 t.kr. seinasta ár.

### Tøkur peningur

Tøki peningur felagsins er hækkaður við 757 t.kr., úr 1.810 t.kr. til 2.567 t.kr. í 2011.

### Framtíðarútlit

Mett verður, at felagið framhaldandi fer at hava eitt positivt gjaldføri í 2012.

### Hendingar eftir roknskaparlok

Eftir roknskaparlok er onki hent, sum avgerandi broytir metingina av ársfrásøgn felagsins.

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin er løgd fram eftir ásetingunum í ársroknskaparlógini fyri flokk B-fyritøkur.

Ársfrásøgnin er løgd fram eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár.

**Alment um innrokning og virðisáseting**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar í stigum, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavning á fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herí avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum fylgja av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrar-roknskapin.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva fyritøkuni fíggjarligar fyrimunir, og virðið kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr fyritøkuni, og virðið kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiserað útveganarvirði, har ein støðug effektiv renta verður innroknað yvir tíðarskeiðið. Amortiserað útveganarvirði verður uppgjørt sum upprunaligt útveganarvirði frádrigið møguligan avdrátt, umframt ískoyti/frádrátt av akkumleraðu amortiseringini av muninum millum útveganarvirði og áljóðandi virði. Á henda hátt verður kurstap og kursvinningur býttur á ogn og skuld yvir tíðarskeiðið.

Innrokningar og virðisásetingar taka hædd fyri tapum og váðum, ið vóru væntað við roknskaparlok, sum síðani eru sannað ella avsannað innan ársfrásøgnin verður løgd fram.

**Umrokning av fremmandum gjaldoyra**

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyramunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða innroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarligum inntøkum og kostnaðum.

Støðisognir, ið eru keyptar í fremmandum gjaldoyra, verða innroknaðar til kursin á handilsdegnum.

## Rakstrarroknskapur

**Nettosøla**

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og við avsláttri í sambandi við søluna frádrignum.

**Annar uttanhýsis kostnaður**

Annar uttanhýsis kostnaður er kostnaður til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, leigu, tap av áognarum.

**Skattur av ársúrsliti**

Skatturin í árinum, ið er partafelagsskatturin fyri árið og broytingin í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapin við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum og innroknaður beinleiðis á eginognina við tí parti, sum viðvíkur bókingum beinleiðis á eginognina.

## Fíggjarstøðan

**Materiell støðisogn**

Vegir, brýr, undirsjóvartunnil, tekniskur útbúnaður, tøkni, rakstrartól og innbúgv eru tikin við til útveganarvirði, frádrigið avskrivingar. Avskrivingarvirðið, sambært § 1,4 í "Anleggslógini", er sett til kr. 163.300.000

Avskrivingargrundarlagið er útveganarvirði við væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð frádrignum.

Tær linjeru avskrivingarnar eru grundaðar á fylgjandi metingar av væntaðu livitíðini:

| | |
|---|---|
| Vegir og undirsjóvartunnil | 10 - 14 ár |
| Tøkniútbúnaður | 3 - 5 ár |
| Rakstrartól | 5 ár |
| Innbúgv | 10 ár |

Smáamboð við útveganarvirði undir 20 t.kr. verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Vinningur ella tap við at avhenda materiella støðisogn verða uppgjørd sum munurin millum sølupris og roknskaparliga virðið á søludegnum, frádrigið sølukostnað. Vinningur ella tap verður innroknað í rakstrarroknskapin undir avskrivingum.

**Niðurskriving av støðisogn**

Roknskaparliga virðið á bæði immateriellari og materiellari støðisogn verður hvørt ár mett við atliti at ábendingum um virðislækkingar umframt ársins avskrivingar.

Eru ábendingar um virðislækking, verður ein niðurskrivingarkanning gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurútveganarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurútveganarvirði verður hægra virði av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðu nettoinntøkum frá at nýta ognina ella ognarbólkin.

**Vørugoymslur**

Kubbar og eykalutir verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFO-háttinum. Um nettorealisatiónsvirðið er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Nettorealisatiónsvirðið fyri vørugoymslur verður uppgjørt sum søluprísur, frádrigið kostnað til liðugtgerð og kostnað til at gjøgnumføra søluna. Nettorealisatiónsvirðið verður ásett við atliti at sølubæri, ókuransi og gongdini á væntaðum søluprísi.

**Áogn**

Áogn frá sølu og tænastuveitingum verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Niðurskrivað verður til nettorealisiónsvirðið fyri at standa ímóti møguligum tapi.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, er goldin kostnaður, sum viðvíkur komandi roknskaparárum.

**Partafelagsskattur og útsettur skattur**

Skyldugur skattur verður tikin við í fíggjarstøðuna, sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku, við møguligum javningum fyri skatti frá undanfarnum árum.

Útsettur skattur verður uppgjørdur eftir mununum millum roknskaparliga og skattliga virðið á ognum og skyldum, uppgjørd við grundarlagi í ætlaðu nýtsluni av ognini ella hvussu skyldan skal rindast aftur.

Útsettur skattur verður útroknaður við grundarlagi í galdandi skattareglum og skattaásetingum, sum við roknskaparlok eru galdandi, tá útsetti skatturin væntandi skal gjaldast. Broytingar í útsetta skattinum, sum eru avleiðingar av broytingum í skattasatsum, verða tiknar við í rakstrarroknskapinum. Í hesum árinum er skattasatsurin 18%.

**Skuld**

Fíggjarlig skuld verður innroknað sum lántøka til útveganarvirði, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verður fíggjarlig skuld innroknað til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni, soleiðis at munurin, millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið, verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Í fíggjarligum skyldum verður eisini innroknað tann kapitaliseraða restleasingskyldan á fíggjarligum leasingavtalum.

Onnur skuld, sum fevnir um vøru- og tænastuskuld, skuld til assosierðar fyritøkur og onnur skuld, verða tiknar við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virði.

**Tíðaravmarkingar**

Í tíðaravmarkingum undir skuld verða móttikin gjøld fyri inntøkur, sum viðvíkja komandi roknskaparárum, innroknað.

## Gjaldførisfrágreiðing

Gjaldførisfrágreiðingin vísir gjaldførisávirkanina frá rakstri, íløgum og fígging fyri roknskaparárið, broytingar í tøkum peningi, umframt tøkan pening við roknskaparbyrjan og roknskaparlok.

**Peningastreymur frá rakstri**

Peningastreymur frá rakstri verður uppgjørdur sum ársins úrslit javnað við ikki kontantum rakstrarpostum, broytingum í rakstrarfígging og goldnum partafelagsskatti.

**Peningastreymur frá íløgum**

Peningastreymur frá íløgum eru gjøld sum stava frá, at støðisogn er keypt ella seld.

**Peningastreymur frá fígging**

Peningastreymur frá fígging er broytingar í støðd ella samanseting á partapeningi og kostnaðir í hesum sambandi. Harumframt er peningastreymurin lántøka, avdráttir av rentuberandi skuld, broyting í ábyrgdarlánum og útgoldið vinningsbýti til eigararnar.

**Peningur**

Peningur er tøkur peningur, umframt stuttfreistað virðisbrøv, ið ótarnað kunnu umbýtast við tøkan pening, og har lítil váði er fyri virðisbroytingum.

# Lyklatøl

Lyklatøl eru í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings "Anbefalinger & Nøgletal 2005".

Høvuðs- og lyklatølini í yvirlitinum eru roknað soleiðis:

| | |
|---|---|
| **Skiftisavkast** | Bruttoúrslit x 100 / Nettosølu |
| **Rakstraravkast (EBIT-avkast)** | Rakstrarúrslit (EBIT) x 100 / Nettosølu |
| **Trygdarevni** | Eginogn uttan minnilutapartar við roknskaparlok x 100 / Skyldur tilsamans við roknskaparlok |
| **Úrslit*** | Ársúrslit, frádrigið partin hjá minnilutapartinum |
| **Renting av eginogn** | Úrslit* x 100 / Eginogn í miðal uttan minnilutapartar |

# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|
| | Nettosøla | 22.248.021 | 21.127.072 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 2.597.401 | 2.585.784 |
| | Annar uttanhýsis kostnaður | -5.432.867 | -5.150.476 |
| | **Bruttoúrslit** | **19.412.555** | **18.562.380** |
| 1 | Starvsfólkakostnaður | -3.713.600 | -3.554.520 |
| | Avskrivingar av materiellari støðisogn | -11.659.168 | -12.125.071 |
| | **Rakstrarúrslit** | **4.039.787** | **2.882.789** |
| | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -1.821.306 | -2.382.084 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **2.218.481** | **500.705** |
| 2 | Skattur av ársúrsliti | -399.327 | -90.126 |
| | **Ársúrslit** | **1.819.154** | **410.579** |
| | **Uppskot til býti av ársúrsliti:** | | |
| | Flutt úrslit | 1.819.154 | 410.579 |
| | **Býtt tilsamans** | **1.819.154** | **410.579** |

# Fíggjarstøða

## OGN

| Nota | | 31/12 2011 | 31/12 2010 |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| 3 | Lendi, vegir og undirsjóvar- tunnil | 200.355.193 | 211.679.238 |
| 3 | Tøkni og maskinur | 280.629 | 449.238 |
| 3 | Rakstrartól og innbúgv | 960.405 | 343.457 |
| | Materiell støðisogn tilsamans | 201.596.227 | 212.471.933 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **201.596.227** | **212.471.933** |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Eykaluta goymsla | 172.512 | 189.787 |
| | Goymsla, kubbar | 377.720 | 446.810 |
| | Vørugoymslur tilsamans | 550.232 | 636.597 |
| | Vøru- og tænastuáogn | 1.093.165 | 1.245.539 |
| | Onnur áogn | 1.292.727 | 266.040 |
| | Áogn tilsamans | 2.385.892 | 1.511.579 |
| | Peningur | 2.566.962 | 1.810.061 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **5.503.086** | **3.958.237** |
| | **OGN TILSAMANS** | **207.099.313** | **216.430.170** |

## SKYLDUR

| Nota | | 31/12 2011 | 31/12 2010 |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 4 | Felagskapitalur | 160.300.000 | 160.300.000 |
| 5 | Flutt úrslit | 5.723.688 | 3.904.534 |
| | **Eginogn tilsamans** | **166.023.688** | **164.204.534** |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| 6 | Avsett til útsettan skatt | 1.875.805 | 1.476.478 |
| | **Avsettar skyldur tilsamans** | **1.875.805** | **1.476.478** |
| | **Skuld** | | |
| 7 | Skuld til peningastovnar | 17.673.981 | 30.052.021 |
| | Langfreistað skuld tilsamans | 17.673.981 | 30.052.021 |
| 7 | Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 12.585.043 | 12.078.560 |
| | Móttikin undangjøld frá kundum | 6.852.093 | 6.003.488 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 177.504 | 588.682 |
| | Trygd, kubbar | 1.911.199 | 1.812.799 |
| | Onnur skuld | 0 | 213.608 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 21.525.839 | 20.697.137 |
| | **Skuld tilsamans** | **39.199.820** | **50.749.158** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **207.099.313** | **216.430.170** |

**8 Veðsetingar og trygdarveitingar**

**9 Eventualskyldur**

## Gjaldførisfrágreiðing

| Nota | | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|
| | **Úrslit áðrenn rentur** | 4.039.787 | 2.882.789 |
| | Avskrivingar | 11.659.169 | 12.125.071 |
| | Broytingar í vørugoymslum | 86.365 | -144.724 |
| | Broytingar í áogn | -874.313 | 592.028 |
| | Broytingar í vøruskuld og aðrari skuld | 223.819 | -3.010.136 |
| | **Peningastreymur frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar** | **15.134.827** | **12.445.028** |
| | Rentuútgjaldingar og líknandi | -1.821.306 | -2.382.084 |
| | **Peningastreymur frá rakstri** | **13.313.521** | **10.062.944** |
| | Keyp av materiellari støðisogn | -783.463 | -619.122 |
| | Søla av materiellari støðisogn | 0 | 55.487 |
| | **Peningastreymur frá íløgum** | **-783.463** | **-563.635** |
| | Inngjøld, trygd kubbar | 98.400 | 60.921 |
| | Broyting, lán Íleggingargrunnurin | -11.871.557 | -11.514.758 |
| | **Peningastreymar frá fígging** | **-11.773.157** | **-11.453.837** |
| | **Broyting í tøkum peningi** | **756.901** | **-1.954.528** |
| | Tøkur peningur 1. januar 2011 | 1.810.061 | 3.764.589 |
| | **Tøkur peningur 31. desember 2011** | **2.566.962** | **1.810.061** |
| | **Tøkur peningur** | | |
| | Peningur | 2.566.962 | 1.810.061 |
| | **Tøkur peningur 31. desember 2011** | **2.566.962** | **1.810.061** |

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| **1. Starvsfólkakostnaður** | | |
| Løn | 3.351.718 | 3.178.035 |
| Eftirløn | 246.600 | 269.073 |
| Aðrir kostnaðir viðv. sosialari trygd | 115.282 | 107.412 |
| | **3.713.600** | **3.554.520** |
| Starvsfólk í miðal | 8 | 8 |
| **2. Skattur av ársúrsliti** | | |
| Broyting í útsettum skatti | 399.327 | 90.126 |
| | **399.327** | **90.126** |

**3. Materiell støðisogn**

| | **Lendi, vegir og undirsjóvar-tunnil** | **Tøkni og maskinur** | **Rakstrartól og innbúgv** |
|---|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2011 | 302.338.721 | 6.938.424 | 1.102.131 |
| Tilgongd | 0 | 107.704 | 675.758 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2011** | **302.338.721** | **7.046.128** | **1.777.889** |
| Av- og niðurskrivingar 1. januar 2011 | 90.659.484 | 6.489.186 | 758.673 |
| Avskrivingar í árinum | 11.324.044 | 276.313 | 58.811 |
| **Av- og niðurskrivingar 31. desember 2011** | **101.983.528** | **6.765.499** | **817.484** |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2011** | **200.355.193** | **280.629** | **960.405** |

| | 31/12 2011 | 31/12 2010 |
|---|---|---|

## 4. Felagskapitalur

| | 31/12 2011 | 31/12 2010 |
|---|---|---|
| Felagskapitalur 1. januar 2011 | 160.300.000 | 160.300.000 |
| | **160.300.000** | **160.300.000** |

**Felagskapitalur**

| Felagskapitalur er býttur soleiðis: | | |
|---|---|---|
| 1 stk. áljóðandi 20.300.000 kr. | 20.300.000 | 20.300.000 |
| 7. stk. áljóðandi 20.000.000 kr. | 140.000.000 | 14.000.000 |
| | **160.300.000** | **160.300.000** |

Øll partabrøvini hava eins rættindi.

## 5. Flutt úrslit

| | 31/12 2011 | 31/12 2010 |
|---|---|---|
| Flutt úrslit 1. januar 2011 | 3.904.534 | 3.493.955 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | 1.819.154 | 410.579 |
| | **5.723.688** | **3.904.534** |

## 6. Avsett til útsettan skatt

| | 31/12 2011 | 31/12 2010 |
|---|---|---|
| Avsetingar til útsettan skatt 1. januar 2011 | 1.875.805 | 1.476.478 |
| | **1.875.805** | **1.476.478** |

## 7. Langfreiðstað skuld

| | **Avdráttir fyrsta árið** | **Restskuld eftir 5 árum** | **Skuld tils. 31/12 2011** | **Skuld tils. 31/12 2010** |
|---|---|---|---|---|
| Langfreistað skuld til peningastovnar | 12.585.043 | 0 | 30.259.024 | 42.130.581 |
| | **12.585.043** | **0** | **30.259.024** | **42.130.581** |

## 8. Veðsetingar og trygdarveitingar

| | Veð lýst í | Veðupphædd |
|---|---|---|
| 1. veð. skbr. Íleggingargrunnurin, | matr. nr. 401b Kvívík | 200.000.000 |
| 1. veð. skbr. Íleggingargrunnurin, | matr. nr. 373e Sandavágur | 200.000.000 |
| 1. veð. skbr. Íleggingargrunnurin, | leysafæ, tekniskur útbúnaður | 200.000.000 |
| | | **600.000.000** |

## 9. Eventualpostar

Øll teknað hald hava rindað eina trygd uppá kr. 300 fyri kubban, ið fæst aftur, um kubbin verður latin innaftur til felagið.

Felagið hevur í 2011 undirskrivað leigusáttmála við Norðoya Sparikassa um leigu av skrivstovuhølum á Hoyvíksvegi 65, 100 Tórshavn. Leiguavtalan stendur við til eigari ella leigari skrivliga sigur sáttmálan upp við 12 mánaða freist, tó ikki til fráflyting áðrenn tann 15. september 2016.

Felagið hevur undirskrivað tænastusáttmálar fyri røkt av vegum, undirsjóvartunli og útgerð.

**Tryggingarviðurskifti**

| | |
|---|---|
| **All Risk-trygging:** | |
| Skaða á tunnil-/útgerð | 25.000.000 |
| Rakstrartap | 5.000.000 |
| **Virkistrygging:** | |
| Skaða á persón | 70.000.000 |
| Skaða á lutir | 15.000.000 |
| **Ábyrgdartrygging**: | |
| Ábyrgd nevnd- og stjórn pr. skaða/ár | 5.000.000 |
| **Leysafætrygging:** | |
| Skrivstovuinnbúgv | 230.000 |
| Telduútgerð og tøkni | 270.000 |
| Vørugoymsla | 1.000.000 |
| Databeraratrygging | 500.000 |
| Meirkostnaðtrygging | 500.000 |
| Flytandi samskiftisútgerð | 85.000 |

Bilur er ábyrgdar- og skrokktryggjaður. Arbeiðsskaða- og vinnuferðatrygging er teknað.